

## KOYRHB Í SKÁPIÐ

*Klaksvískingar settu veruliga føroyameistararnar uppá pláss, tá teir greitt vunnu »gamla klassikararn«*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

í gjár, men málið hjá HB var væl spælt. Jón Krosslág Poulsen heldur væl upp á bóltin og sendir hann inn um til Símun Samuelsen, ið gevur HB eina vón. Hvørki Jón Krosslág Poulsen ella Símun Samuelsen spæla við fullari ferð í løtuni, og tað býr meira í teimum enn tað teir vístu í gjár.

### Verjuvilla kostar

Eina løtu eftir málið trýstir HB, men fyri uttan eitt skot í síðunetið, so er sjáldan vandamikið framman fyri málinum hjá Gunnari á Steig. Í hinum endaðum eru HB-miðverjarnir óansnir í tveimum førum. Fyrst er tað Rógvi Holm, ið missur bóltin lang uppi á KÍ-hálvuni, men einki kemur burtur úr mótálopinum. Men átta minuttir fyri tíð verður HB revsað, tá Rói Danielsen missur bóltin á miðari egnari hálvu. Innskifti Filip Djordjovic vinnur bóltin og letur hann til Kristoffur Jacobsen, sum rekur og dribblar til hann gerst leysur og avgerð dystin. Í evstu løtu økti Hjalgrím Elltør eftir stutt horna. Úr vinstu dregur hann inn til høgra beini og meddar til.

### KÍ vann miðvøllin

HB hevur nú tapt tveir dystir á rað 4-1 og er útspælt í báðum førum. Okkurt er galið í HB, og í gjár tóktust klaksvíksingar at vera nógv betri fyri, hvat orku viðvíkjur. Helst mundi størsta mistakið hjá HB vera at spæla við bara tveimum mitt á miðjuni, tí mangan høvdu Nenad Stankovic, Høgni Madsen og Hjálgrím Elttør lætt spæl á miðvøllinum.

Nenad Stankovic sum tann verjukendi við góða yvirblikkinum og frálíku avleveringinum, Høgni Madsen sum stríðsmaðurin og Hjalgrím Elttør sum tann álopskendi, skapandi og hóttandi við sínum dribblingum og nógvu ferð. Fróði Benjaminsen og Kári Nielsen taptu í gjár dystin um miðvøllin.

Sterkasta vápnið hjá klaksvíksingum eru skjótálopini. Fleiri ferðir vunnu teir bóltin framman fyri egnum brotsteigi og runnu HB umkoll í skjótálopunum. Tað gingu eisini bara tíggju minuttir av seinna hálvleiki, til HB skifti Ólav í Ólavstovu inn á stríðast á miðvøllinum. Tá var longu ov seint, og teir bláu og hvítu høvdu longu takið á dystinum.

### Einki niðurflytingar tos í Klaksvík

Um KÍ megnar at spæla á sama stigi sum í gjár, so verður niðurflytingartos ikki at hoyra aftur í Klaksvík í ár. Sterkastir í myndini stóðu Hjalgrím Elttør, Høgni Madsen og Nenad Stankovic á miðvøllinum, saman við Kristoffuri Jacobsen, sum saman við liðskiparinum skoraði tvey mál. Tað var eisini hugaliga at síggja ungar menn roynast so væl. Eisini innskiftu leikarar sum Ivan Joensen og Filip Djordjevic kom inn og spæla ein avgerandi leiklut.

Hjá HB duttu fleiri leikarar niður ímillum. Serliga lítið eyðsýndur vóru Símun Samuelsen og Fróði Benjaminsen, sum annars hava verið HB drúgvir. Símun Samuelsen tykist framvegis darvaður av sjúku, meðan KÍ dugir væl at spæla rundan um styrkirnar hjá Fróða Benjaminsen á miðvøllinum. Liðskiparin hjá HB hevði seinasta korterið fleiri royndir á KÍ-málið, men nærri enn stongini kom hann ikki. Hinum royndinum hevði Gunnar á Steig ikki stórvegis trupulleikar av. Mest eyðsýndi leikarin hjá HB var Kristin R. Mouritsen, sum umframt sítt sermerkta reyða hár, eisini var tann HB leikarin, ið megnaði at fylgja orkufullu klaksvíkinginum. HB skal komandi umfar spæla móti B71 á útivølli. Brádliga sær tað út sum ein botnuppgerð, sum ikki hevur ein so greiðan favorit sum undan hesum umfarinum.

*trondur@sosialurin.fo*

## Julian Hansen, HB venjari:

# – Eg eri undir trýsti

Eftir dystin stóðu fjølmiðlarnir í kø fyri at tosa við Julian Hansen, venjara hjá HB. Meðan leikarar, hjálparfólk og dómarar komu av vøllinum, so kom ongin Julian Hansen. Hann sat á útskiftingsbonkinum saman við málmans venjarinum og sá ógvuliga hugsingarsamur út. Hann tóktist biða sjónvarpi bíða eina løtu við samrøðuni, meðan teir báðir tosaðu um okkurt innanhýsis.

– Eg visti áðrenn eg kom til HB, at eg kundi koma undir trýst. Tað kemur við starvinum sum venjari og eg eri klarur til at taka ímóti tí. Eg havi stuðul frá leiðsluni og í felag ætla vit at venda gongdini, sigur ein róligur, men samstundis avgjørdur Julian Hansen.

Hann metir ikki, at formurin er munurin á liðnum, men váttar at hann kanska var ov djarvur við at byrja inni við Andrew av Fløtum og Jón Krosslá Poulsen í álopinum.

– Ætlanin við at byrja inni við Andrew av Fløtum var, at tað skuldi geva okkum nakrar møguleikar í álopunum. Tað kann gott vera, at hann enn manglar tey seinastu prosentini, tí hann hevur verið skaddur leingi, sigur Julian víðari.

Julian saknar somuleiðis, at menn taka ábyrgd á liðnum, nakað sum var eyðsýnt í dystinum. Ein av teimum, ið hevur tikið ábyrgd seinastu dystirnar er íslendski miðverjin, Doddi, men hann hevur HB sent heim.

– Vit mugu finna eina loysn og kanska eru nakrir av okkara leikarum enn ov ungir. Men hon verður funnin við tí hópinum, sum vit hava í løtuni, sigur Julian víðari.

Tað hevur verið nógv skrivað um HB seinastu tíðina í fjølmiðlinum. Fyrst var tað ein søga um at Julian sjávur var koyrdur og Sigfríður Clementsen skuldi taka yvir. Síðani kom søgan við Dodda, sum var fjølmiðlinum í hendi áðrenn HB megnaði at leggja tíðindaskriv út.

– Tá tú kemur til eitt felag sum HB, so veist tú at tað altíð fer at verða nógv skriving og nógvar gitingar millum fólk og í fjølmiðlinum. Tað er ikki nakað sum eg hugsi so nógv um og eg haldi heldur ikki tað hevur ávirkað leikararnar nakað, sigur Julian Hansen at enda.

*trondur@sosialurin.fo*

## MÁLINI:

**1**-0: (23.) Kristoffur Jacobsen




**2**-0: (37.) Hjalgrím Elttør




2-**1**: (58.) Símun Samuelsen




**3**-1: (82.) Kristoffur Jacobsen




**4**-1: (90.) Hjalgrím Elttør




Dribbling ···· Avlevering — Skot/Mál